# Løgtingsvalið 20. januar 2004
## og Løgtingsvalið 30. apríl 2002

## Løgtingsvalið 30. apríl 1998

*Runavík var nýtt valstað í 2002. Samanteljingin 1998 er fyri valstøðini: Glyvrar, Lamba, Rituvík, Søldarfjørð og Æðuvík.

| | Fólkaflokkurin A | | Sambandsflokkurin B | | Javnaðarflokkurin C | | Sjálvstýrisflokkurin D | | Tjóðveldisflokkurin E | | Miðflokkurin H | | Hin stuttligi flokkurin K | | Fólkaflokkurin (1998) | Sambandsflokkurin (1998) | Javnaðarflokkurin (1998) | Sjálvstýrisflokkurin (1998) | Tjóðveldisflokkurin (1998) | Kr. Fólkaflokkurin (1998) | Miðflokkurin (1998) | Verkamannafylkingin (1998) |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | 2004 | 2002 | 2004 | 2002 | 2004 | 2002 | 2004 | 2002 | 2004 | 2002 | 2004 | 2002 | 2004 | 2002 | | | | | | | | |
| **Norðoyar:** | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| 1. Árnafjørður | | 15 | | 2 | | 5 | | 4 | | 14 | | 5 | | | 9 | 4 | 3 | 5 | 17 | 10 | 0 | 0 |
| 2. Fossanes | | 96 | | 41 | | 52 | | 22 | | 62 | | 15 | | | 79 | 19 | 37 | 14 | 50 | 47 | 10 | 13 |
| 3. Haraldssund | | 12 | | 1 | | 4 | | 0 | | 28 | | 0 | | | 1 | 1 | 3 | 1 | 38 | 0 | 0 | 0 |
| 4. Hattarvík | | 5 | | 2 | | 3 | | 0 | | 4 | | 0 | | | 7 | 0 | 2 | 1 | 6 | 0 | 0 | 0 |
| 5. Húsar | | 5 | | 6 | | 13 | | 0 | | 5 | | 0 | | | 3 | 4 | 10 | 0 | 7 | 2 | 0 | 0 |
| 6. Kirkja | | 2 | | 5 | | 3 | | 9 | | 3 | | 0 | | | 0 | 1 | 3 | 9 | 2 | 0 | 0 | 0 |
| 7. Klaksvík | | 995 | | 415 | | 638 | | 322 | | 690 | | 86 | | | 816 | 225 | 530 | 338 | 749 | 205 | 51 | 6 |
| 8. Kunoy | | 8 | | 5 | | 8 | | 3 | | 27 | | 0 | | | 6 | 0 | 5 | 3 | 29 | 0 | 0 | 0 |
| 9. Mikladalur | | 14 | | 2 | | 10 | | 0 | | 22 | | 0 | | | 9 | 1 | 19 | 0 | 18 | 1 | 0 | 0 |
| 10. Svínoy | | 20 | | 12 | | 5 | | 0 | | 12 | | 0 | | | 22 | 12 | 1 | 0 | 7 | 1 | 0 | 0 |
| 11. Syðradalur | | 1 | | 0 | | 1 | | 0 | | 4 | | 0 | | | 0 | 1 | 3 | 0 | 3 | 0 | 0 | 0 |
| 13. Viðareiði | | 92 | | 22 | | 44 | | 9 | | 30 | | 8 | | | 95 | 7 | 31 | 14 | 31 | 9 | 1 | 0 |
| **Tilsamans** | | **1265** | | **515** | | **786** | | **366** | | **901** | | **114** | | | **1047** | **275** | **647** | **385** | **957** | **277** | **62** | **19** |
| **Eysturoy** | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| 14. Eiði | | 76 | | 106 | | 59 | | 16 | | 141 | | 49 | | | 28 | 56 | 43 | 10 | 104 | 10 | 138 | 0 |
| 15. Elduvík | | 2 | | 9 | | 8 | | 0 | | 1 | | 0 | | | 1 | 9 | 12 | 0 | 0 | 0 | 1 | 0 |
| 16. Fuglafjørður | | 245 | | 275 | | 198 | | 29 | | 267 | | 30 | | | 263 | 147 | 165 | 61 | 265 | 13 | 14 | 4 |
| 17. Funningsfjørður | | 8 | | 8 | | 13 | | 4 | | 14 | | 1 | | | 2 | 8 | 6 | 2 | 16 | 3 | 0 | 0 |
| 18. Funningur | | 9 | | 11 | | 15 | | 5 | | 17 | | 3 | | | 10 | 3 | 18 | 11 | 17 | 3 | 2 | 5 |
| 19. Gjógv | | 7 | | 11 | | 3 | | 3 | | 19 | | 0 | | | 9 | 8 | 3 | 2 | 20 | 2 | 1 | 0 |
| 20. Glyvrar | | | | | | | | | | | | | | | 136 | 205 | 78 | 180 | 160 | 90 | 59 | 7 |
| 21. Gøta | | 138 | | 141 | | 146 | | 26 | | 134 | | 37 | | | 127 | 124 | 115 | 74 | 80 | 4 | 25 | 6 |
| 22. Hellurnar | | 1 | | 7 | | 8 | | 0 | | 4 | | 0 | | | 1 | 4 | 5 | 1 | 6 | 0 | 0 | 0 |
| 23. Lamba | | | | | | | | | | | | | | | 8 | 27 | 8 | 14 | 5 | 5 | 8 | 0 |
| 24. Leirvík | | 121 | | 115 | | 120 | | 20 | | 135 | | 13 | | | 184 | 52 | 94 | 31 | 133 | 31 | 8 | 2 |
| 26. Oyndarfjørður | | 26 | | 26 | | 20 | | 19 | | 16 | | 0 | | | 26 | 21 | 26 | 11 | 17 | 1 | 0 | 0 |
| 27. Oyrarbakki | | 36 | | 141 | | 36 | | 13 | | 57 | | 5 | | | 31 | 120 | 41 | 21 | 33 | 0 | 9 | 4 |
| 28. Rituvík | | | | | | | | | | | | | | | 6 | 62 | 7 | 28 | 42 | 22 | 1 | 2 |
| 29. Runavík* | | 287 | | 413 | | 113 | | 309 | | 276 | | 128 | | | **(208)** | **(327)** | **(101)** | **(341)** | **(248)** | **(137)** | **(72)** | **(14)** |
| 30. Selatrað | | 7 | | 37 | | 6 | | 0 | | 20 | | 0 | | | 14 | 24 | 3 | 3 | 22 | 1 | 2 | 0 |
| 31. Skála | | 45 | | 98 | | 141 | | 31 | | 70 | | 14 | | | 29 | 74 | 130 | 43 | 56 | 3 | 16 | 3 |
| 32. Skálafjørður | | 4 | | 8 | | 12 | | 2 | | 14 | | 8 | | | 0 | 3 | 14 | 10 | 9 | 2 | 7 | 0 |
| 33. Strendur | | 86 | | 249 | | 107 | | 22 | | 70 | | 31 | | | 89 | 202 | 76 | 43 | 57 | 7 | 24 | 0 |
| 34. Søldarfjørður | | | | | | | | | | | | | | | 52 | 27 | 8 | 108 | 32 | 5 | 4 | 5 |
| 35. Toftir | | 75 | | 384 | | 89 | | 56 | | 109 | | 35 | | | 63 | 350 | 62 | 45 | 94 | 27 | 34 | 3 |
| 36. Æðuvík | | | | | | | | | | | | | | | 6 | 6 | 0 | 11 | 9 | 15 | 0 | 0 |
| **Tilsamans** | | **1173** | | **2029** | | **1084** | | **556** | | **1384** | | **356** | | | **1085** | **1532** | **914** | **709** | **1177** | **244** | **353** | **42** |



## VALGREINAR

# Veljið framtíðina – veljið Føroyar!

**Vilmund Jacobsen**
*valevni Tjóðveldisflokksins í Eysturoy*



Latið ikki Føroyar følna!
Latið ikki Sambandsflokkin og Javnaðarflokkin sleppa at steðga tí framburði, vit hava havt seinastu árini!
Latið ikki ábyrgdarleiðina, sum Tjóðveldisflokkurin stendur fyri, gerast til ábyrgdarloysi hjá øðrum flokkum!
Latið ikki tað mál, sum nú er í eygsjón, kámast burtur í sambands-og javnaðartoku!

Góðu veljarar! Brettið upp armar saman við Tjóðveldisflokkinum. Latið okkum framhaldandi stýra móti vita, sum ikki er langt burtur!
Í øðrum londum bardust tey fyri sínum tjóðarfrælsi. Tað var ikki pengapungurin, sum bar tey á mál, men viljin til sjálvi at ráða í egnum landi.
Lat okkum saman stýra føroysku skútuni trygt í havn!
Einki fólk, sum er at sær komið, selir síni tjóðarrættindi fyri tveir pakkar av gummibommum um dagin!
Gevið okkum stuðul á løgtingsvalinum at føra tjóðina fram á mál.
Latið ikki Føroyar følna!
Veljið framtíðina, veljið Føroyar – veljið Tjóðveldisflokkin týsdagin!

# Høvi at velja og vraka

**Súsanna Dam**
*valevni Sambandsflokksins í Suðurstreymoy*



Fullveldisflokkarnir ætla loysing fyrst, og hugsing aftaná.
Er tað leiðin okkum øllum at frama. Kunnu vit ikki fáa eina betri og tryggari gongd móti størri sjálvbjargni og menning?
Tey ætla at kvetta verandi sambondini við umheimin fyri at knýta onnur og øðrvísi, uttan at veljarin veit, hvørji hesi bondini eru.
Tey hava reypa um sína skynsomu fíggjarligu stýring undanfarnu 6 árini, tó at tey lata eftir seg eina fallandi framleiðsluvinnu, eina fíggjarlóg við halli og aðrar bindingar uppá hundraðtals milliónir, - nógvar milliardir um alt verður íroknað - sum enn ikki síggjast á fíggjarlógini, t.d. nýggi Smyril, tunlar og ikki minst allar yvirtøkurnar.
Tey hava málað og yrkt fagrar myndir av fullveldinum, men høvdu ikki skil til at seta tað í verk, tí tey dugdu ikki at laga seg til síni egnu krøv.
Latið okkum senda fullveldissamgonguna í søguna, sum størstu dølgar hetta landið nakrantíð hevur sæð. Annað hevur hon ikki uppiborið.
Latið okkum hesa ferð velja politikkarar, sum ikki kvetta, men heldur í samvinnu við Grønland og Danmark laga ríkisfelagsskapin til at halda mótvegis teimum krøvum, nútíðin setur.
Latið okkum velja politikarar, sum við einum frælslyntum og varnum fíggjarpolitikki skapa karmar um eitt virkið vinnulív, sum aftur er høvuðsstreytin fyri øllum sjálvbjargni og framburði.
So at vit í Føroyum:

- kunnu geva okkara børnum tey bestu korini
- kunnu bjóða øllum áhugaðum eina nøktandi útbúgving
- kunnu bjóða øllum eitt avbjóðandi lívsstarv
- kunnu veita øllum ið tørva, neyðuga viðgerð og røkt.
- kunnu taka okkum av øllum teimum, sum onkusvegna ikki hava fingið so lætta atgongd til lívsins avbjóðingar og úrtøku.

Hetta megna vit, sum nú er bert innanfyri ríkisfelagsskapin, har vit hava nútíðarhóskandi rættarverju, altjóðaviðurkent gjaldføri, afturat óteljandi øðrum tænastum, sum fullveldissamgongan enn ikki hevur hugsað um at stovna.
Svart Samband rópa aðrir flokkar, men vil eingin teirra verða hesar góðar fyriuttan, og tí klandraðist, slitnaði og brotnaði fullveldið við ella kanska av øllum sínum gabbi.
Latið okkum vísa, at vit nú vilja hava ein miðvísan, praktiskan politikk og seta ein sterkan Sambandsflokk á ting. Vel lista B ella okkurt valevni á listanum.
Gott val!

# Mentanarligt varskó

**Sámal Petur í Grund**
*valevni Sjálvstýrisfloksins í Suðurstreymoy*



Allar kreftir innan mentanina eiga at standa øksl móti øksl.
Av og til uppliva vit tíverri, at ágangur av ymiskum slagi verður framdur móti tí sum vit eru góð við, og tað kann elva til miklan sársaka.
Soleiðis var hjá mær, tá valupplegg Miðfloksins bleiv lagt fram. Flokkurin sum í sínum skjøldri hevur eina stevnu, sum eigur at viðfarast við størsta varsemi, kom út við einum boðskapi sum var ófrættakendur.
Mest markanti boðskapurin var eitt stórátak ímóti føroyskari mentan.
Føroyska mentanin er ein partur av samleika okkara og hongur so nógv av okkum sjálvum við uppií mentanini.
Tað sum tó undrar í størstan mun er tann sannroynd, at júst ein stórur partur av tí sum er okkum heilagt og kristiligt, hongur óloysiliga saman við mentan okkara.
Vit hava sum fólk verið bangin fyri, at komu vit av álvara inn í eina oljuvinnu, so mátti mentanin styrkjast, so at vit ikki blivu kollrend av fremmandari mentan.
Oljuvinnan er ikki av álvara komin í gongd, men nú kom eitt álop á mentan okkara innanífrá, úr okkara egna fólki.
Sjálvstýrisflokkurin hevur verið tað forum hvar mentafólk hava kunnað úttala seg.
Flokkurin umsat mentanarøki í øllum samgongum hann sat í, heilt fram til samgonguna sum bleiv skipað í 1998.
Nú flokkurin ikki hevur umsitið málsøki í 6 ár, kemur hendan hóttanin inn yvir mentanina.
Mentafólk, lat okkum enn einaferð standa øksl móti øksl og verja fedranna sið.
Verjið føroysku mentanina - Veljið Sjálvstýrisflokkin.

# Loyvi, at bryggja sterkan løg í Føroyum!

**Terji Rasmussen**
*Valevni sjálvstýrisfloksins í suðurstreymoy*



Vit hava í nógv ár bryggja øl í Føroyum, við góðum úrslitið. Eg haldi, at tíðin er búgvin til eisini at geva loyvi, at bryggja sterkan løg. Føroyingar drekka brennivín, um vit vilja tað ella ikki. Hví ikki fáa fíggjarliga ágóðan av hesum eisini?
Um loyvi varð givið, hevði ein stórur partur av teim mongu milliónunum vit nú senda av landinum, ligið eftir her heima.
Hetta gevur eisini møguleika fyri enn eini vøru, ið kann útflytast. Ein partur av inntøkunum kundi eisini fari til upplýsing um vandan, ið stendst av ov nógvum drekkarið.
Hvør kann? D kann!

# Jógvan við Keldu sigur ósatt um Sambandsflokkin

**Valevni Sambandsfloksins í Norðoyggjum**

Í seinasta Norðlýsinum hevur Jógvan við Keldu eina yvirskrift sum ljóðar soleiðis: "Sambandsflokkurin var ímóti Norðoyatunnlinum."
Fyri at prógva hetta siterar hann Jyllandsposten frá 1998, har Edmund Joensen sigur soleiðis: "Men Edmund Joensen skønner, at han nok kan blive genvalgt uden de stemmer." Víðari sigur Edmund um prísin: "Den slags udregninger slår ofte fejl, ingen ved hvad der skjuler sig i grunden under fjorden. Derfor kan prisen lige så godt blive 500 mill. kroner eller en milliard.
Síðan siterar Jógvan við Keldu formann Sambandsfloksins, Lisbeth L. Petersen, fyri at hava sagt: "Ja, vit høvdu prioritera annarleiðis.'"
Oman fyri nevndu sitat prógva ikki, at Sambandsflokkurin hevur verið ímóti Norðoyatunnlinum, sum Jógvan við Keldu vil vera við. Tað ber væl til at verða ósamdur um prís og prioriteringar, uttan at verða ímóti at eitt arbeiði verður gjørt.
Sambandsflokkurin hevur tí ikki verið ímóti Norðoyatunnlinum, tvørturímóti taka vit fult út undir við at Norðoyatunnilin verður gjørdur, og gleðast um tað veldugu framstig hetta fer at hava fyri Norðoyggjar og landið alt.
Jógvan við Keldu nevnir í somu grein nakrar úrbyggingar í Klaksvík:

- Útbygging av Klaksvíkar Sjúkrahúsi
- Trygdardepilin skal staðfestast og útbyggjast
- Tekniski Skúlin skal útbyggjast
- Aðrir almennir skúlar skulu byggjast í Klaksvík

Um hesar útbyggingar sigur Jógvan við Keldu: "Soleiðis sum Sambandsflokkurin altíð hevur verið ímóti átøkum í Klaksvík - ikki bert Norðoyatunnlinum - soleiðis verður hann ímóti øllum hesum útbyggingum."
Vit kunnu bert staðfesta, at Jógvan við Keldu aftur her sigur ósatt og roynir at vinna sær atkvøður, við at fara fram við ósannindum um Sambandsflokkin. Hetta er syrgiligt, men orðatakið sigur at "mangt verður í neyðini nýtt."
Allir norðoyingar kunnu hava fult álit á Sambandsflokkinum, vit vilja gera okkara besta til gagns fyri Klaksvíkina og Norðoyggjar allar.